Eydna Skaale • Myndir: Jens Kristian Vang

# Føroyski búnin við einum twisti

**Summi øsa seg, onnur øtast. Men tey flestu halda tað vera bæði forvitnisligt og stuttligt. Hvørja ólavsøku økist talið á kvinnubúnum í øðrvísi litum og samansetingum. Vit hava hitt fýra kvinnur, ið hava fingið sær føroysk klæðir við einum twisti**



Durita Lamhauge Jóansdóttir
Úr Hoyvík

**Nær fekst tú klæðini?**
Tá eg gjørdist student í 2001

**Hvussu kanst tú lýsa tíni klæðir?**
Míni klæði eru grøn. Skjúrtið er sterkt grønt og svart, og troyggjan er eisini grøn og svørt. Fyrriklæðið og turriklæðið eru svørt við gulum, reyðum og hvítum sóljum og bláum gloym meg ei. Eg havi sjálv kombinerað mynstrið.

**Hví valdi tú júst hesar litirnar?**
Eg hugsaði leingi um blá, men mær dámar væl grønt, og grønt var eitt sindur serligari tá. Blátt var meiri vanligt.

**Hví ikki vanliga reyð/svarta búnan?**
Eg vildi fegin royna okkurt annað. Tími ikki at vera akkurát sum øll hini.

**Hevur tú fingið nakra viðmerking um klæðini?**
Ja, tá eg fekk tey, hoyrdi eg nógv fyri, at tey vóru spesiell, tí tey vóru grøn. Tá var tað rættiliga serligt, men nú eru grøn klæði púra vanlig.

**Hvat heldur tú um, at fólk eru ímóti broytingum av búnanum?**
Eg haldi, at tað er nakað tvætl, tá fólk siga, at tey eiga at vera reyð. Tað er ikki tað gamla, sum nógv siga. Tann reyði liturin er komin aftaná.



Súsanna Olafsdóttir Skaale
Úr Tórshavn

**Nær fekst tú klæðini?**
Eg fekk klæðini í 2007. Smúkkurnar samlaði mamma mín sær tá hon var 14. Nú havi eg arvað tær.

**Hvussu kanst tú lýsa tíni klæðir?**
Eg vildi ynskt eg kundi lýst míni klæði við einari romantiskari søgu fullari av nostalgi og sál sum gekk aftur til langommu mína, men lýsingin er stutt: nýggj klæðir, tí damuni dámar blátt :)

**Hví ikki vanliga reyð/svarta búnan?**
Tí hesin blá/ grøni liturin er mín yndislitur.

**Hevur tú fingið nakra viðmerking um klæðini?**
Eg fekk eina stuttliga viðmerking í dag, tá eg, í búnanum, var á veg oman í Miðlahúsið at taka mynd til hesa greinina: tað var tað ein, ið spurdi meg, um eg skuldi oman í DEEP at strippa :-)

**Hvat heldur tú um, at fólk eru ímóti broytingum av búnanum?**
Summi ting mugu broytast fyri at varðveitast.